# Nýggj myndabók útkomin

**Mánadagin kemur út nýggj myndabók, sum eru á tremur við vøkrum náttúru-myndum av Føroyum. Henrik Solberg hevur ferðast kring Føroyar og tikið myndirnar**



HEINI Í SKORINI
*Bókaútgáva*

Nýggja myndabókin, sum mánadagin verður givin út, ber navnið "Føroyar", og er hetta heitið sera hóskandi, við tað at sjáldan er vakurleiki Føroya so væl sýndur fram sum í hesi bók.

Henrik Solberg hevur tikið myndirnar, og býr hann saman við konu og dóttir á Tvøroyri. Henrik Solberg hevur tikið myndir síðani hann keypti eitt fototól í 1988, og í 1993 byrjaði hann uppá ljósmyndir.

Myndirnar í bókini eru tiknar frá 1993 og fram, men hóast tað er flestu myndirnar heilt nýggjar. Bókin kostar 165 krónur, og kemur hon sum sagt út mánadagin við nýggjum og vøkrum myndum av Føroyum.

Henrik Solberg er ikki fulltíðar myndamaður, hóast høvuðsinntøka hansara er myndatøka. Hann hevur eitt søluarbeiði við síðuna av, men við tað at hann hevur ferðast nógv kring Føroyar sum sølumaður, hevur hann havt nógvar møguleikar at tikið myndir. Men seinastu trý árini hevur Henrik Solberg fingið sær meiri frítíð frá søluarbeiðinum, so hann hevur kunnað tikið fleiri myndir.

Myndirnar hjá Henrik í bókini "Føroyar" eru tíðarkrevjandi, tí tað krevjast langir fjallatúrar til fleiri av myndum hansara.

Hóast Henrik Solberg er nógv umbiðin sum myndamaður til ymisk tiltøk, hevur hann tó halgað tíð sína til náttúruna. Hann sigur, at hann kennir náttúruna at vera sítt øki, og at hann ynskir at nýta tíð sína sum myndamaður í føroysku náttúruni.

Henrik leggur afturat, at útgávan "Føroyar" er ein gamal dreymur, og vónandi verður hetta ikki fyrsta útgávan frá Henrik Solberg.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og okkurt ælið, annars sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri, mikudagin upp í ein strúk av landnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 11 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 18 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 32 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 24 |
| Miami | -- |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. við Vestur-Noreg fer norðureftir og grynnist.




Lufttrýstið er høgt, 1024 hPa. norðan fyri Azorurnar og ein hátrýstryggur til Íslands fer eystureftir og verður yvir Føroyum sunnunáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/07 kl. 06[00]– 13/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 12/07 kl. 06[00]– 13/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 27,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

20. juli: Tendring - Økusól
21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. juli | 01.48 | 14.16 | 00.48 | 13.16 | 01.03 | 13.31 | 03.48 | 16.16 | 04.48 | 17.16 | 00.03 | 12.31 | 11.31 | 23.54 | 02.03 | 14.31 | 03.03 | 15.31 | 01.33 | 14.01 | 02.48 | 15.16 |
| 15. juli | 02.39 | 15.03 | 01.39 | 14.03 | 01.54 | 14.18 | 04.39 | 17.03 | 05.39 | 18.03 | 00.54 | 13.18 | — | 12.18 | 02.54 | 15.18 | 03.54 | 16.18 | 02.24 | 14.48 | 03.39 | 16.03 |
| 16. juli | 03.25 | 15.48 | 02.25 | 14.48 | 02.40 | 15.03 | 05.25 | 17.48 | 06.25 | 18.48 | 01.40 | 14.03 | 00.40 | 13.03 | 03.40 | 16.03 | 04.40 | 17.03 | 03.10 | 15.33 | 04.25 | 16.48 |
| 17. juli | 04.11 | 16.34 | 03.11 | 15.34 | 03.26 | 15.49 | 06.11 | 18.34 | 07.11 | 19.34 | 02.26 | 14.49 | 01.26 | 13.49 | 04.26 | 16.49 | 05.26 | 17.49 | 03.56 | 16.19 | 05.11 | 17.34 |
| 18. juli | 05.00 | 17.27 | 04.00 | 16.27 | 04.15 | 16.42 | 07.00 | 19.27 | 08.00 | 20.27 | 03.15 | 15.42 | 02.15 | 14.42 | 05.15 | 17.42 | 06.15 | 18.42 | 04.45 | 17.12 | 06.00 | 18.27 |

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fjarðalið 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Antennu-monteringar
Vit avgreiða allar antennu-monteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
Fokus ELEKTRONIK
J. Broncksgøtu 34
Tlf. 311306 - Fax 311306

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DE-POSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

HESTPRENT Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn